# Ætla at fara undir at ala to

**Suðuroyingar fara nú at biðja Vinnumálaráðið og Fiskirannsóknarstovuna um loyvi til at taka toskayngul av Føroya Banka til aling**

TOSKAALING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Toskaaling kann gerast ein framtíðar vinnugrein í Føroyum.

Á evnisdegnum hjá Suðuroyar Sparikassa og Føroya Tele um menning í Suðuroy metti Hørður Wardum, alifrøðingur, at toskaaling kann gerast eitt lønandi alternativ til laksaaling í Føroyum.

Sjálvur var hann biðin um at siga sína hugsan um aling á harðbalnum sjóøkið eystanfuri Suðuroynna, men hann kom skjótt til ta niðurstøðu, at enn liggur hetta nakað frammi í tíðini.

Ístaðin umrøddi hann møguleikan at fara undir toskaaling í Suðuroynni.

## Nógvir fyrimunir við at ala tosk

Hørður Wardum sigur, at tað eru nógvir fyrimunir við at ala tosk framum laks.

– Í fyrstu atløgu hóskar hitin í sjónum í Føroyum seg nógv betri til toskaaling enn til laksaaling.

– Harafturat ber til at tryggja marknaðinum eina heilt støðuga levering og tað ber til at halda eina javna dygd, tí dygdina ber til at stýra heilt neyvt við tí fóðuri, sum fiskurin fær. Við fóðrinum ber eisini til at stýra fitini í livrini akkurát sum vit vilja.

Hann segði eisini, at Føroya Banki er rætta staðið at taka yngul, tí toskurin á Føroya Banka hevur heilt serligar vakstrareginleikar og veksur munandi skjótari enn annar toskur. Bankatoskur verður 70 sentimetrar upp á trý ár, men toskur av landgrunninum verður bara 50 sentimetrar upp á trý ár.

– Orsøkin til hetta er ikki bara, at bankatoskurin fær meiri at eta, tí royndir vísa, at verða bankatoskar og toskar av landgrunninum sleptur í kør, har teir fáa nágreiniliga tað sama at eta, veksur bankatoskurin eisini skjótari undir slíkum umstøðum.

Alifrøðingurinsegði, at harafturat vísir tað seg, at aldur fiskur fær væl hægri prís enn fiskaður fiskur, tí at leveringin og dygdin verða so jøvn og tað eru keypararnir sinnaðir at betala fyri.

Hann vísti á, at ein norðmaður alir upsa, sum hann selur fyri heilar 30 krónur fyri kilo.

– Tað vísir seg, at kann ein útflytari tryggja støðuga levering og støðuga dygd, fær hann eisini hægri prís. Royndir við toskaaling í Noreg vísa eisini, at tað fáast fleiri krónur meiri fyri kilo av aldum toski enn tað fáast fyri fiskaðan tosk tí at tað ber til at tryggja støðuga levering.

Hinvegin er tað ógvuliga ymiskt, hvussu nógvur toskur er at fáa í vanligum fiskiskapi og tað ger tað torført at gera bindandi, góðar avtalur við keyparar um levering.

Harafturat vísti Hørður Wardum á, at sum heild er fiskiskapurin eftir toski í Norðuratlantshavi minkaður meiri enn eina helvt hesi seinastu árini. Í 1986 vórðu tvær milliónir tons av toski fiskað í Norðuratlantshavi, men í 2002 var tað komið niður á 800.000 tons.

Hann sigur, at hetta hevur gjørt sítt til at skunda undir aling av toski.

– Samstundis er alitoskur púra óstrongdur, tá ið hann verður blóðgaður og royndir vísa, at tað hevur stóran týdning fyri dygdina.

– Somuleiðis er meiri fiskur á tí alda toskinum, soleiðis at úrtøkan er eini 50-60%, afturímóti eini úrtøku uppá 40-45 % á fiskaðum toski.

Harafturat er sporførið eisini heilt nágreiniligt og tað er nakað, sum keyparar seta størri og størri krøv til.

Sjálvur heldur hann, at tað er skilagott, at flakavinnan er við í eini slíkari ætlan so at aldi toskurin kann virkast víðari á flakavirkjunum.

– At ala tosk kann hava tvinnandi endamál. Hann kann bæði útflytast beinleiðis, men hann kann eisini vera við til at tryggja flakavirkjunum arbeiði.

– Harafturat fæst full nytta burturúr toskinum, tí umframt flakið, kunnu bæði høvd, skræða, innvølir, rogn og sil og skrokkur nýtast í øðrum framleiðslum.

Hann segði, at hinvegin er tað ein vansi, at tað kostar meiri at ala tosk enn at fiska tosk.

– Tí kann aldur toskur ikki seljast á uppboðssølu, tí tá verður prísurin ov ójavnur og vágin verður ov stórur.

## Kann stuðla uppundir flakavinnuna

Samanumtikið helt Hørður Wardum, at vit hava rættiliga góðar møguleikar ala tosk í Føroyum.

Sjálvur metti hann at verður yngulin havdur í kørum til hann er 500 gramm, kemur hann at ganga 10-12 mánaðir í ringum á sjónum og tá hevði tað borið til at ala eini 6000 tons av toski í Suðuroy um árið.

– Verður fiskurin koyrdur á sjógv smærri, verður framleiðslutíðin á sjónum longri og tá ber til at ala eini 2000-3000 tons.

Annars heldur hann, at tøknin til laksaaling og toskaaling líkist nógv, men vitan má fáast aðrastaðni, bæði av Fiskaaling, men eisini úr Noregi.

Hann vísti eisini á, at norðmenn arbeiða hart fyri



*Eini 60 fólk vóru á evnisdegi hjá Suðuroyar Spariassa og Føroya Tele um menningarmøguleikar í Suðuroy. fyrimunur er, at hitin í sjónum í Føroyum hóskar seg nógv betri til toskaaling enn til laksaaling*


GRANSKINGARLEIÐARI

P/F Fiskaaling søkir eftir einum granskingarleiðara, ið skal hava ábyrgdina av at menna eitt granskingarumhvørvi innan aling av fiski og skeljadjórum.

Felagið miðar eftir at ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi innan aling í Føroyum og í samstarvi við aðrar granskingarstovnar í Føroyum og uttanlanda, at byggja upp eitt granskingarumhvørvi á høgum fakligum støði. Talan verður um vinnuliga gransking, ið skal verða við til at menna núverandi og komandi aling, har brúkarin verður settur í miðdepilin.

Vit vænta, at granskingarleiðarin hevur góð evni at geva íblástur til aðrar granskarar og at skapa netverk við umheimin. Granskingarleiðarin skal m.a. raðfesta og fyrireika nýggjar verkætlanir og leiðbeina øðrum granskarnum. Ein týðandi uppgáva verður eisini at miðla vitan og úrslit frá granskingar- og menningarvirkseminum til vinnuna, almenningin og granskarar og annars at veita ráðgeving innan aling

KRØV OG YNSKI TIL UMSØKJARAN:

· Viðkomandi prógv frá hægri lærustovni
· Royndir innan granskingarvirksemi - Ph.D.-prógv er ein fyrimunur
· Góð leiðslu- og samstarvsevni
· Góð evni at samskifta á enskum, bæði í skrift og talu

SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika fyri at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu og í mun til útbúgving og starvsroyndir. Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá Fiskaaling við Áir. Meiri fæst at vita við at venda sær til Ingolf Joensen, stjóra, tel. 474747.

UMSÓKN

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu, í seinasta lagi 20. juni 2005 kl. 12.00, sendast til:

P/F Fiskaaling
Við Áir
430 Hvalvík

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 19. Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiðið við laksi og sílum, eins og arbeitt verður við at menna kalva og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Arbeitt verður við at umleggja kynbótaarbeiðið, og felagið ætlar framyvir at leggja størri orku í gransking, sum náttúrliga hoyrir undir virkisøki felagsins. Meiri fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo.

TEAM85

